

## Henrik Larsen blandar seg uppí

Køge, sum fekk hálvvánaliga byrjan í donsku 1. deild í ár, er nú rættiliga komið fyri seg, og felagið stevnir nú ímóti toppinum í næstbestu donsku deildini. Í gjár spældi Køge á heimavølli ímóti toppliðnum SønderjydskE, og liðið hjá fyrrverandi føroyska landsliðsvenjaranum Henrik Larsen vann 2-1. Hetta var fimti sigur hjá Køge á rað, og liðið liggur nú nummar trý – eitt stig aftanfyri oddaliðið Lyngby.

## Eingin sáttmáli til Símun

Føroyski landsliðsspælarin í fótbólti Símun Samuelsen hevur farnu vikuna verið til royndarvenjing í danska superligafelagnum OB. Niðurstøðan eftir hesa royndarvenjing er, at Símun fær ikki sáttmála við felagið.

- Tað fekk væl hjá Símn, og vit fara fylgja við gongdini hjá honum frameftir, sigur Michael Hemmingsen, hjálparvenjari hjá OB.

Símun Samuelsen hevur í hálvtannað ár spælt fyri íslendska felagið Keflavík, og har hevur tað gingið heilt væl hjá honum.

GÍ-B36 1-2 (0-1):

# B36 tryggjaði sær bronsuna



*B36 vann seinasta dystin á árinum, sum varð spældur í Gøtu*

*Mynd: Anton Højgaard*

GÍ

B36

**Bæði liðini høvdu nógvar kjansir at gera mál, men tað var B36, sum vann dystin og tryggjaði sær bronsumerkini í Formuladeildini**

GÍ-B36
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Dysturin í Gøtu leygardagin var helst tann dysturin, sum hevði minst týdning av øllum dystunum. Dysturin hevði onga ávirkan á meistaraskapin ella niðurflytingina, men bronsan og Intertoto stóðu upp á spæl.

B36 skuldi vinna fyri at tryggja sær bronsuna, og GÍ hevði ein møguleika at vinna billett til europeiskan fótbólt næsta ár, um teir vunnu.

Liðini kundu spæla frítt, tey vildu bæði vinna, og tað legði upp til ein lívligan og undirhaldandi dyst. Og dysturin var eisini heilt góður. Bæði í fyrra og í seinna hálvleiki søktu liðini støðugt at málinum hjá hvørjum øðrum, og tað skapti kjansir.

### B36 gjørdi málini

B36 kom á odda 10 minuttir fyri hálvleiksteðgin, og tað var landsliðsspælarin Fróði Benjaminsen, sum setti bóltin í málið. B36 hevði horna, bólturin endaði út hjá Hanus Thorleifsson, hann legði inn fyri, og har setti Fróði hegnisliga fótin undir bóltin og stýrdi hann í GÍ-meskarnar.

B36 skifti tveir spælarar út í hálvleiksteðginum, og tað var kanska ein ásannan av, at venjarin vildi geva onkrum av teimum, sum ikki hava spælt fast við, møguleikan í seinna hálvleiki. Herbert í Lon Jacobsen og Sylla fóru út, og Bárður Joensen og Obi komu inn fyri teir.

Júst Obi skoraði seinna málið hjá B36. Tað var, tá ið ein tími var spældur. GÍ-rangstøðufellan kiksaði, og slapp Obi leysur ígjøgnum. Hann var tryggur og skoraði til 2-0 til B36.

### GÍ svaraði aftur.

GÍ legði nógv fyri fram eftir vøllinum í seinna hálvleiki, og teir høvdu fleiri tilboð at gera mál.

Samstundis fekk B36 eisini pláss til kontraálop, og teir skaptu sanniliga eisini vandamiklar støður, sum kundu havt enda við onkrum máli afturat.

Tað gjørdist GÍ, sum fekk seinasta orðið í dystinum. Bólturin varð spældur inn fyri til Sam Jacobsen, sum á brotsteigarmarkinum plaseraði bóltin fram við Jákupi Mikkelsen og í B36-málið.

Eftir hetta var spennandi eina løtu, men GÍ kláraði ikki at javna, og teir á høvuðsstaðarliðinum høvdu tryggjað sær bronsumerkini í Formuladeildini.

## Kundi verið betur

GÍ-veteranurin Magni Jarnskor helt eftir seinasta dystin, at GÍ kundi havt fingið meira burtur úr kappingarárinum í ár.

- Vit byrjaðu sera væl, men so komu vit inn í eina downperiodu, sum varði alt ov leingi. Vit kláraðu ikki at vinna okkara dystir, og vit hava spælt 11 javnleikir í ár. Javnleikir muna alt ov lítið, tá ið tú fært trý stig fyri at vinna ein dyst, segði Magni Jarnskor.

- Vit høvdu ein møguleika at røkka bronsuna áðrenn seinasta dystin, men nú endaðu vit nummar 6, og eg haldi, at vit kundu havt rokkið longur fram í ár. Hetta er sjálvandi eitt stórt framstig samanborið við í fjør, tá ið vit vóru heilt nær við at flyta niður, segði hann.

## Vit skulu bara vinna

Hanus Thorleifsson var væl nøgdur við, at B36 hevði vunnið dystin í Gøtu, og harvið hevði tryggjað sær bronsumerkini.

- Vit spældu um bronsuna, men tað er ikki akkurát tað sama, sum at spæla um FM-heitið, og tí hevði dysturin ikki størri týdning enn eitt vist. Men vit vildu sjálvsagt vinna dystin, og tað kláraðu vit. Vit vildu bara hava dystin lidnan og vinna øll trý stigini, segði Hanus.

- Bæði liðini royndu at vinna dystin, men eg haldi, at tað var í lagi, at vit vunnu. Samanumtikið vóru vit tað betra liðið. Teir høvdu nakrar møguleikar at skora, men vit høvdu helst fleiri møguleikar enn teir, segði Hanus Thorleifsson.